# Konan hjá Peter Lundin stendur fram

**Mariann Poulsen er navnið á ungu konuni hjá Peter Lundin. Hon hevur nú valt at koma fram og fortelja sína síðu av søguni. Tað ger hon í »Go Aften Danmark« á TV2 í kvøld.**



LUNDIN-MÁLIÐ

*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

24 ára gamla Havnagentan, Mariann Poulsen, traðkar nú fyri fyrstu ferð alment fram í ljósmálan hjá miðlunum. Hon hevur annars verið sera fámælt síðan Ekstra Bladet avdúkaði brúðleyp hennara við einum av mest umtalaðu drápsmonnum í søgu Danmarks, Peter Lundin. Men nú hevur hon valt at geva almenninginum sína síðu av málinum.

- Eg havi mist alt. Øll henda søgan hevur kostað mær so nógv, at eg haldi tað er tíð til at fortelja mína síðu av søguni, um hvat veruliga er farið fram, sigur hon við Ekstra Bladet í dag. Nógvir miðlar hava ringt, og eg skal hava tíð til at tosa við teir allar, áðrenn eg fari til Føroya í morgin, sigur Mariann Poulsen við Ekstra Bladet í dag.

### Elskarindan ikki við barn

- Eg vildi ongantíð komið fram, um ikki tingini høvdu útviklað seg soleiðs, sum tey nú einaferð hava. Men nú vita øll alíkavæl eitt sindur, nevnliga eitt forskrúvað bílæt av sannleikanum um meg. So nú vil eg fortelja tí røttu søguna, sigur Mariann Poulsen.

Spurd um, hvør hennara rætta søga er, sigur hon at »Tað kunnu tit síggja í Go Aften Danmark í kvøld«.

Nakað vildi hon tó avsløra fyri Ekstra Bladet, millum annað at hin kvinnan, sum kallar seg fyri damuna hjá Peter Lundin, als ikki er við barn.

- Hon, sum B.T. kallar »Kirsten«, er als ikki er við barn, og Peter hevur longu lagt sak móti B.T. fyri at føra søguna, sigur Mariann Poulsen við Ekstra Bladet.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Hvassur vindur ella skrið av útsynningi, seinnapartin upp í storm. Ælingur, men onkur sólglotti og hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av útsynningi, seinnapartin nakað minni vindur av vestri. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fyrrapartin upp í ein stúk av útsynningi og yvirhøvur turt, men seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind av vestri og ælingur. Hitin millum 6 og 9 stig,

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og vestri og okkurt ælið, men eisini sólglottar. Hitin millum 6 og 10 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -1 |
| Nuuk | 2 |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | 1 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 2 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 10 |
| London | 12 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 11 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 11 |
| Keypmannah. | 12 |
| Helsinki | 11 |
| Moskva | 17 |
| Berlin | 12 |
| Warzawa | 16 |
| Kiev | 16 |
| Bukarest | 19 |
| Paris | -- |
| Madrid | -- |
| Róm | 22 |
| Malorca | 24 |
| Athen | 26 |
| Malta | 23 |
| Tunis | 24 |
| Beijing | 22 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 26 |
| Jakarta | 33 |
| Sydney | 35 |
| New York | 16 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 23 |
| Meksikobýur | 22 |
| Panama | 29 |
| La Paz | 18 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 23 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt stormlágtrýst, 950 hPa. í útsynning úr Íslandi fer spakuliga í landnyrðing og brúgvalagið í útsynning úr Føroyum fer eystureftir.



**Í dag:**
Stormlágtrýstið skamt í útsynning út Íslandi fer spakuliga í landnyrðing og grynnist. Eitt brúgvalag vestan fyri Írland fer í landnyrðing og verður yvir Føroyum fríggjadagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 2/10 kl. 06⁰⁰ – 3/10 06⁰⁰. Hitin í gjár: 4,2°
Minsti hiti máldur í oktober: -4,0° - Mesti hiti máldur í oktober: 18,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 5/10 kl. 06⁰⁰ – 6/10 06⁰⁰.
Avfallið higartil í oktober: 61 mm

javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo

Alt um harmonikur



www.simme.eu

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 5. oktober | Mánin longst frá jørðini |
| 7. oktober | Fyrra kvarter |
| 14. oktober | Fullmáni |
| 17. oktober | Mánin næstur jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 9. okt | 3:15 | 15:35 | 2:15 | 14:35 | 2:30 | 14:50 | 5:15 | 17:35 | 6:15 | 18:35 | 1:30 | 13:50 | 0:30 | 12:50 | 3:30 | 15:50 | 4:30 | 16:50 | 3:00 | 15:20 | 4:15 | 16:35 |
| 10. okt | 3:56 | 16:16 | 2:56 | 15:16 | 3:11 | 15:31 | 5:56 | 18:16 | 6:56 | 19:16 | 2:11 | 14:31 | 1:11 | 13:31 | 4:11 | 16:31 | 5:11 | 17:31 | 3:41 | 16:01 | 4:56 | 17:16 |
| 11. okt | 4:36 | 16:55 | 3:36 | 15:55 | 3:51 | 16:10 | 6:36 | 18:55 | 7:36 | 19:55 | 2:51 | 15:10 | 1:51 | 14:10 | 4:51 | 17:10 | 5:51 | 18:10 | 4:21 | 16:40 | 5:36 | 17:55 |
| 12. okt | 5:15 | 17:35 | 4:15 | 16:35 | 4:30 | 16:50 | 7:15 | 19:35 | 8:15 | 20:35 | 3:30 | 15:50 | 2:30 | 14:50 | 5:30 | 17:50 | 6:30 | 18:50 | 5:00 | 17:20 | 6:15 | 18:35 |
| 13. okt | 5:55 | 18:15 | 4:55 | 17:15 | 5:10 | 17:30 | 7:55 | 20:15 | 8:55 | 21:15 | 4:10 | 16:30 | 3:10 | 15:30 | 6:10 | 18:30 | 7:10 | 19:30 | 5:40 | 18:00 | 6:55 | 19:15 |

Lesið Sosialin